## Nógv kyksilvur

Tað er framvegis nógv kyksilvur í føroyskum toski. Ein kanning, sum Maria Dam, doktari í kemi og projektleiðari á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, hevur gjørt saman við Katrini Hoydal, vísir, at nógv kyksilvur er í toskinum í ár. Tað ørkymlar kortini ikki teir báðar granskararnar, tí soleiðis hevur gongdin verið í nógv ár, og hóast kyksilvurinnihaldið í toskinum er stórt, er tað framvegis væl niðan fyri markið, sum ES setir.

## Eivør í Sandavági

Skírisdag tann 5. apríl kl. 17 fáa fólk í Sandavági høvi at hoyra ta kendu songkvinnuna Eivør Pálsdóttir. Tann dagin fer hon at hava konsert í Sandavágs kirkju, og er konsertin í sambandi við, at tann 29. apríl eru 90 ár liðin, síðani kirkjan í Sandavági varð vígd. Enn er skráin fyri konsertina ikki endaliga løgd, men hon verður kunngjørd so skjótt, hon er liðug. Tað eu Sandavágs kommuna og kirkjan, sum skipa fyri konsertini.

# ðis kommunu



*Í góðveðrinum í gjár vórðu øll trý húsini, sum AK-Byggivirki byggir á Kollshjøllum, reist*
*Mynd: Birgir W. Høgnesen*



*Á hesi myndini sæst, hvar raðhúsini verða bygd, beint omanfyri Hotel Eiði – við frálíkum útsýni úr fleiri vindeygum*
*Mynd: Anfinnur Kruse*

at hygga at húsunum, bæði uttan og innan.

- Tað er bara at siga til, so kunnu fólk síggja, hvat tað er, vit gera – og hvussu vit gera okkara arbeiði, sigur byggiharrin.



*Tað er Stórabeding í Klaksvík, sum hevur umvælt skaðan, ið línuskipið Kvikk fekk í illveðrinum herfyri*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Skaðin á Kvikki er nú umvældur

**Í storminum eina leygarnátt herfyri, sum gjørdi feigdina um seg ymsastaðni kring landið, frættist, at okkurt skip, sum lá við bryggju, hevði slitið endar. Eitt av skipunum, sum fekk nokso stóran skaða, var línuskipið Kvikk í Klaksvík**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kvikk lá sum norðasta skip við Kósabrúnna hina leygarnáttina herfyri, tá høgættarstormur leikaði í um landið.

Torleif Sigurðsson, reiðari, sigur, at skipið hevur mist út við 14 fiskidagar av skaðanum, sum stóðst av illveðrinum.

- Kvikk lá væl bundin – við nógvum og tjúkkum endum, men kortini sleit skipið fleiri av endunum og rak við hekkuni fyri aftur á stevnið á línuskipinum Klakki, sum lá beint aftanfyri.

Hann sigur, at nakrir av yvirmonnunum vóru komnir til skipið hesa náttina og skuldu flyta skipið burtur, tí ikki var liggjandi.

- Vindurin var nógvur, men tað var serliga tann nógva og stóra aldan, sum kom inneftir vánni, ið gjørdi, at skipið setti so nógv á endarnar.

Torleif sigur, at tá Kvikk hevði slitið og var rikin aftur ímóti stevninum á Klakki, lá Klakkur og "bukaði" niður í hekkuna á Kvikki.

- Tað vísti seg nevniliga, at tá Kvikk fór niður við aldunum, hevjaði stevnið á Klakki seg uppeftir, og soleiðis lá Klakkur og bukaði niður á hekkuna á Kvikki.

Umsíðir eydnaðist manningini, sum komin var á Kósabrúnna, at sleppa umborð á skipið og sleppa frá bryggju.

Tað er Stórabeding í Klaksvík, sum hevur umvælt skaðan, og í gjárkvøldið kundi Kvikk loysa aftur.

- Manningin skuldi vera hjá skipinum klokkan 19 í gjárkvøldið, og síðan varð lagt út á hav. Hendan túrin er Tommy Sivertsen skipari, og manningin telir 14, sigur reiðarin.

Í fjør misti Kvikk nógva fiskitíð, tá skipið varð longt í Hirtshals.

- Skipið var soleiðis úr vinnu frá síðst í apríl og út í endan av oktober.

Torleif Sigurðsson sigur, at hóast fiskitíðin í fjør var stutt – stívliga fimm mánaðir tilsamans, fiskaði Kvikk kortini fyri út við 8 miljónir krónur.

Sosialurin var á bryggjuni í Klaksvík í gjár, tá manningin tók agn og ís, áðrenn loyst varð til nýggjan túr.



*Kvikk tekur agn og ís, og so verður loyst til nýggjan túr. Farið verður undir Føroyar at royna. Ætlandi goymir Kvikk Íslandskvotuna til heystar*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*